# TILTØK

SAMBAND
SIGRID TRÖNDARSON
SIGRID@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

**Tórshavnar Hvítusunnu-samkoma, Yviri við Strond**
Sunnudagin kl. 11 Morgun-møti, kl. 18 Evangel. møti. Øll eru vælkomin.

**Saron, Flatnavegur 7, Vestmanna**
Sunnudagin 20./5. evangeliskt møti klokkan 18.

**Filadelfia, Miðvágur**
Mánadag til leygardag kl. 17.30 bøn fyri hvítu-sunnustevnuni.
Sunnudagin kl. 11 familju- og morgunmøti við sunnu-dagsskúla, Tummas Jacobsen talar.

**Kedron í Sørvági**
Sunnudagin 20.5. Breyð-bróting við Læru kl. 11. Evangeliskt møti kl. 18. Øll eru hjartaliga vælkomin.
**Børnini Møtast:**
Børnini møtast kl. 11 í kjall-aranum í KEDRON, har øll børn eru hjartaliga vælkomin. Mikudagin 23.5. Bønarmøti kl. 20.

**Lívsins Orð, Saltangará**
Sunnudagin kl. 10.30 Møti. Øll hjartaliga vælkomin.

**Meinigheitshúsið á Skála**
Sunnudagur 20. mai Sunnu-dagsskúli kl. 13.30.
Onki møti.

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 21 Awake við Erland Tværfoss.
Sunnudagin kl. 17 Møti við Símun Absalonsen. Sangur við Mirjam, Mariu og Helga. Barnamøti kl. 17. Vælkomin í Kelduna. www.keldan.fo

**Missións- og Ungdómshúsið á Glyvrum**
Fríggjadagur kl. 21 ungdóms-møti.
Sunnudagur kl. 14 sunnu-dagsskúli.
Kl. 18 møti v/ Havstein Klein, Saltangará.
Hugnaløta við drekkamunni aftaná.
Mikudagur 23. mai kl. 20 bíbiltími.
Øll eru hjartaliga væl komin

**Norðurstreymoy hevur felagsmissiónsviku í Nesvík 16. – 20. mai 2007**
Fríggjadagur 18. mai kl. 19 Bønarløta á loftsstovuni.
Kl. 19.30 John Myllhamar, Sandavágur, Glyvrakórið syngur. Kl. 22.30 Tiltøk fyri ungdómin
Leygardagur 19. mai
Kl. 19.00 Bønarløta á loftsstovuni. Kl. 19.30 Emil Olsen, prestur, Eiði Kollfirðingar o.o. syngja Innsavning til Heimamissiónina.
Kl. 22.30 Tiltøk fyri ungdómin.
Sunnudagur 20. mai
Guðstænastur í kirkjunum
Kl. 15 Felags sunnudagsskúli/ familjumøti.
Kl. 17.30 Bønarløta á loftsstovuni
Kl. 18 »Syngið við«.
Innsavning til Heima-missiónina.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Thabor, Fuglafjørður**
Sunnudagsskúlin verður sunnudagin kl. 13.30, og møti er sunnukvøldið kl. 18, har Heri Kjærbo talar um evnið »Hvør hevur ábyrgd at reka missión?«. Ársgávan til Heimamissiónina verður savnað inn.

**Missiónshúsið í Rituvík**
Sunnudagin kl. 18 Sang- og vitnimøti.

**Missiónshúsið í Leirvík**
Sunnudagin kl. 13.30 verður sunnudagsskúli, kl. 18 verður sangð og vitnimøti og kl. 21 ungdómsmøti.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**KFUM & K, Klaksvík**
Fríggjadagin kl. 20 Útimiss-iónsfundur v/ Else Højvang kl. 22 Opið Hús fyri ung.
Sunnudagin kl. 14 Sunnu-dagsskúli, kl. 18 Møti v/ Hilmar Danislsen, kl.21 Ungdómsmøti.

**Frá Soli Deo Gloria Klaksvík**
Sunnukvøldið kl. 18 møti v/ Dánial Á Dul Jacobsen.
Mánakvøld kl. 20 bønarmøti.

**Aglow Klaksvík**
Møti verður á Soli Deo Gloria týskvøldið 22. mai kl. 20.
Allar kvinnur eru hjartaliga vælkomnar.

**Getsemane, á Brekku 19 Klaksvík**
Fríggjakvøldið kl. 20.30 er ungdómsmøti við Eivinn Bringsberg.
Leygardagin kl. 10 er morgun-bøn.
Sunnudagin kl. 14 er møti, sunnudagsskúli er samstundis
Hvønn gerandismorgun kl. 6.15 er morgunbøn.

**Missiónshúsið á Viðareiði**
Møti verður sunnukvøldið 20. mei kl. 18 v/ luttøku frá Solo Deo Gloria.

**Missiónshúsið í Skopun**
Sunnudagin kl. 14 Sunnu-dagsskúli, kl. 18 Møti. Øll eru vælkomin.

**Missiónshúsið í Skálavík**
Fríggjakvøldið og leygar-kvøldið kl. 20 verður møti við Streingjakórinum úr Leirvík. Hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið, Tvøroyri**
Kl: 14 Sunnudagsskúli.
Kl: 18 Møti við Jógvan Højgaard trúboðara og Terja Nielsen.

**Missiónshúsið í Vági**
Fríggjakvøldið kl. 20 Møti við KFUM og K kórinum úr Klaksvík.

**Missiónshúsið í Porkeri**
Leygarkvøldið kl. 20 Møti við KFUM og K kórinum úr Klaksvík.

**Profetisk stevna í Suðuroy**
Profetiska stevnan byrjar hóskvøldið 17. mai kl. 19 á Hotel Øravík.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Leygardag kl. 15 Andakt í sambýlinum í Hvalba.
Kl. 16.30: Um viðrar verður útimøti í Hvalba.
Sunnudag kl. 11 Halgunar-møti. Kl. 14 Sunnudagsskúli.
Kl. 17.30 Bønarløta.
Kl. 18 Evangeliskt møti.
www.frelsunarherurin.fo

**Betania, Sumba**
Møti verður sunnukvøldið kl. 20. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Felagið Tórshavn, gongutúr**
**Sunnudagin 20. Mai.**
Gongutúrur: Skálabotnur – Lokkadyr – Norðskála. Farið verður frá Kunningarstovuni í Havn klokkan kl.10. Minst til at hava góð og heit gongu-klæðir og matpakka við. Tilmelding 302425.

**Sjómansheimið Ørkin Brautarholt 29, Reykjavík**
Hvønn sunnudag kl. 17 og fram til mai 2007 er møti á Ørkini.

**Heilafelagið, felagið fyri apopleksi- og afasirakt**
Tlf. 321520 · t-postur: heilaf@post.olivant.fo

**Veit okkum eina hjálpandi hond**
at seta ein grønmetis ídnað á stovn, millum tey fátæku í Rumenien.
**Ring 905699.** Kostnaðurin er kr. 100 + vanligt uppring-ingargjald. Kundar hjá Kall kunnu ringja. Takk fyri tína hjálpandi hond.
*Calarasi missiónin v/ Thomas J. Askham, Asbjørn Niclasen og Sverri Kjærbæk.*

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag-fríggjadag kl. 10.00-17.00
Teldup.: tilhald@torshavn.fo
***Mánadagin 21. mai***
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 14-17 Kortspæl, telving, landastrok, kánus, bobb o.o. spøl.
***Týsdagin 22. mai***
kl. 10-11.30 Sangur, Zacharias Sørensen og næmingar úr Hoydølum vitja. Øll eru hjartaliga vælkomin.
kl. 15 ***Barnaárini í brennideplinum***, Elin á Rógvi frá barnaútvarpinum
***Mikudagin 23. mai***
kl. 10-12 Tóvirkið (veving, maskinbinding, seyming, binding o.a.) Ása, Katrin, Margit, Marita og Marita.
***Vit fyrireika okkum til Mentanarnáttina 1. juni.***
kl. 15 ***«Líkamsrørsla er av alstórum týdningi fyri at betra um fólkaheilsuna« (AHR). Njóti hetta saman við okkum. Vit ganga. Møti***

## Brúdleyp

Leygardagin 26. mai kl. 16.00 giftast í Vesturkirkjuni Hildur Nielsen og Hans Laksá. Veitslan verður hildin á Hotel Føroyum kl. 19.00.

Sunnudagin 27. maj klokkan 11.30 giftast í Vor Frue Kirke, Svendborg, Bárður Sandá, Vágur og Christina Brust, Svendborg. Veitslan verður fyri innboðin á Hotel Svendborg, Svendborg.

2. hvítusunnudag, 28. mai kl. 16, giftast Sunneva Jakobsen, Tórshavn og Mark Craig, Liverpool í Vesturkirkjuni. Veitslan verður fyri innbodnum seinni um kvøldið í hølunum hjá Starvsmannafelagnum, J. H. Schrøtersgøta 9, Tórshavn.

Leygardagin 9. juni kl. 16.00 giftast í Vágs kirkju Sarina Augustinussen, Vágur og Hans Andrias Thomsen, Vágur. Veitslan verður í VB-húsinum kl. 19.00. Tey ið vilja gleða okkum, við t koma verða vinarliga biðin um at tekna seg á tlf. 373938, 373073, 373294 áðrenn 20. mai.

Leygardagin 23. juni giftast Marin Sigvaldsdóttir úr Miðvági og Kristian R Bláberg úr Hoyvík. Vígslan verður í Miðvágs Kirkju kl. 16. Veitslan verður hildin í Bygdahúsinum kl. 19. Tey íð vilja gleða okkum við at koma, verða biðin um at siga frá á tlf 332920, 217950, 317734 ella 332814 áðrenn 3. juni.

Hey hey! Leygardagin 30. juni fara vit at giftast. Brúdleypið byrjar við vígslu í Miðvágs kirkju kl. 10.30. Aftaná, tvs. kl. 12.00, verður borðhald í Bygdarhúsinum í Miðvági. Um tit hava hug at vera við, sigið so vinarliga frá innan 15. juni á tlf. 333574, 332867 ella 332640, ella á e-post sunberg@post.olivant.fo
***Heilsan Sóleyð Joensen og Sunberg Wang Jacobsen, Sandavágur***

Leygardagin 30. juni giftast Christianskirkjuni kl. 15.00 Bryndis G Petursson og Jóhan Simonsen, Klaksvík. Veitslan verður hildin í Skálanum kl. 19.00 Tey ið vilja gleða brúðarparið at koma, verða biðin um at tekna seg á tlf. 456270, 227172, 224765 ella e-mail: bryndisp@post.olivant.fo áðrenn 11. juni.

Leygardagin 30. juni giftast Jenny á Reynatrøð, Runavík og Magni Høgnesen, Leirvík. Vígslan verður í Glyvra kirkju kl. 13.00. Veitslan verður í bygdarhúsinum í Leirvík klokkan 18.00. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma, verða biðin um at tekna seg við at ringja á tlf. 268688/448128 (Jenny) ella 226361 (Magni) áðrenn fríggjadagin 15 juni.



***Vinarliga Jenny og Magni.***

Leygardagin 30. juni giftast Gunnbjørg Andreasardóttir úr Bø og Andras Andreasen úr Norðradali. Vígslan verður í Bíggjar Kirkju kl.15. Veitslan verður í Norðradali kl.19. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma, verða vinarliga biðin um at siga frá á tlf. 224639 ella 223659 áðrenn 10. juni.

Leygardagin 30. juni giftast Jákup Norðberg úr Hvalba, og Eir Jógvansdóttir av Tvøroyri. Vígslan verður í Tvøroyrakirkju. Veitslan verður í Ítróttarhøllini í Trongisvági kl 19.00. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma, verða biðin um at tekna seg á tlf. 265360, 375224, 272662 ella +4526935393 áðrenn 10. juni.



***Vit skulu giftast***
7.7.07 skulu vit giftast. Dagurin verður hildin í Eydnuni kl.1900. Tey ið ynskja at gleða okkum við at koma í veitslu, vera biðin um at ringja og siga frá á tlf. 422176,422152,422856. Seinasta freist 31/05-07.



***Maibritt og Kári (frá Langasandi) Jóhanna Maria (frá Langasandi) og Jógvan Petur (frá Skopun)***

Leygardagin 7.7.07 giftast Silvia Maria Højgaard, Runavík og Eyðstein Skipanes, Skipanes. Vígslan verður í Glyvra kirkju kl.14.00. Veitsla verður hildin í Mentunarhúsinum í Fuglafirði kl. 18.00. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma í brúdleyp okkara, verða biðin um at siga frá áðrenn 7. juni á tlf. 442244, 773036, 214544.

Leygardagin tann 7.7.07 giftast Johnhild á Løgmansbø úr Miðvági og Pætur Midjord av Argjum. Vígslan verður í Vesturkirkjuni Kl. 12.30 og veitslan verður hildin í Pállsstovu Kl. 16.00
Tey í vilja gleða okkum við at koma, verða biðin um at tekna seg áðrenn 7. juni á tlf : 214858 / 584858 ella á e-post Jelporte@kallnet.fo

Leygardagin 7. juli kl 15.00 giftast í Leirvíkar kirkju, Signa Skorastein, Leirvík og Hans Pauli við Misá, Tórshavn. Veitslan verður í Býgdarhúsinum í Leirvík kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma, verða vinarliga biðin um at siga frá á tlf. 210605, 216110, 316605 ella 443110 áðrenn 20. juni.

Leygardagin 14. juli giftast Vivie Kirke Petersen, Vágur og Bárður Davidsen, Hósvík. Vígslan verður í Framtíðini í Vági kl. 14.00. Veitslan verður hildin á Gistingarhúsinum í Øravík kl. 19.00 uttan børn. Tey ið vilja gleða okkum við at koma, verða biðin at siga frá á tlf. 422056 – 373085 – 374085 ella 0045 36300785 innan 20. juni.

Leygardagin 14. juli giftast Ruth Hansen, av Glyvrum og Andrew av Fløtum, úr Tórshavn. Vígslan verður í Ebenezer kl. 14. Veitslan verður hildin í HB húsinum kl. 19. Tey, ið ynskja at gleða brúðarparið við at koma, verða vinarliga biðin um at siga frá í seinasta lagi 9. juni á tlf. 0045 40682528 (Ruth), 0045 40357906 (Andrew), 316112, 221311 ella á t-post adr. ruthminni@gmail.com

Leygardagin 14. juli giftast Fríðunn Jónolvsdóttir úr Vestmanna og Vermund Vestergaard úr Vági. Vígslan verður í Vágs kirkju klokkan 16. Veitslan verður hildin í VB-høllini klokkan 19. Tey ið vilja gleða brúðarparið við at koma, verða biðin um at tekna seg á telefon: 229756, 273484, 424499 ella 373746 áðrenn 25. juni.

11. august giftast í Miðvági Jonrid Mikkelsen, Tórshavn og Fróði Clementsen, Tórshavn. Brúdleypið verður hildið í SÍF-húsinum. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma, verða biðin um at tekna seg á tlf. 332800 ella 511331 áðrenn 1. juli.

## Silvurbrúdleyp

Mánadagin 25. juni hava Sólgerð og Edmund Joensen, Lamba silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin leygardagin 23. juni í Bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma, verða vinarliga biðin um at tekna seg á tlf. 447203 ella 503451 áðrenn 5. juni.

## 70 ár

Týsdagin 22. mai fyllir Tórgir Strøm, Porkeri, 70 ár. Dagurin verður hildin frá kl. 16.00.